

## Góður túrur

Íslendski frystitrolarin Guðmundur í Nesi, sum er skrásettur í Reykjavík, hevur gjørt ein góðan túr. Morgunblaðið skrivar, at trolarin hevur landað 400 tons av einum túri, sum vardi 24 dagar. Guðmundur í Nesi hevði roynt á einari leið millum Ísland og Grønland, og meginparturin av lastini var svartkalvi, sum er seld til ymsar marknaðir í Asia. Sambært Morgunblaðnum landaði trolarin fyri 237 milliónir íslendskar krónur, sum svarar til á leið 12 milliónir krónur í okkara pengum.

*Reiðaríið Brim eigur trolaran Guðmund í Nesi*

*Mynd. Morgunblaðið*

# Undirsjóvartunnilin gjørdi hol í sjógvin

**Tað tók Eik Banka (Føroya Sparikassa) 174 ár at fáa sær deild í Klaksvík, men klaksvíkingar hava tikið væl ímóti tí gamla peningastovninum**

NÝGGJUR BYGNINGUR

*Jan Müller/Árni Joensen*



*Eitt prýði fyri Klaksvíkina, segði Steinbjørn Jacobsen*

*Mynd: Dávur Winther*

Tað var tann tíð, tá teir tríggir sparikassarnir høvdu hvør sín part av landinum, og tá bankar og sparikassar høvdu at kalla hvør sítt virkisøki. Men soleiðis er ikki í dag. Nú kann eitt viðskiftafólk fara í ein og hvønn peningastovn, sama hvørji ørindini eru, segði Bjarni Olsen, stjóri í Eik Bankaá samkomu í nýggju hølunum, sum bankin flutti í Klaksvík í gjár.

Bjarni Olsen helt, at tað kann tykjast løgið, at tað gingu næstan 174 ár, frá tí at Eik Banki bleiv stovnaður sum Færøe Amts Sparekasse í 1832, til hann lat sína fyrstu deild upp í Klaksvík í 2006. Tað var júst 50 ár eftir, at sparikassin hevði latið upp deild í Vestmanna sum ta fyrstu uttan fyri høvuðsstaðin. 10 ár seinni kom tann í Runavík, og tey næstu árini ein rúgva afturat. Men Klaksvík var ikki á skránni.Men tá so politikararnir gjørdu av at gera undirsjóvartunnil um Leirvíksfjørð, kom vend í. Semja var um at lata deild upp í Klaksvík um tað mundið, tá tunnilin bleiv tikin í nýtslu, og tann 20. februar í 2006 byrjaði Eik Banki í leigaðum hølum í Klaksvík. Góðar tveir mánaðir seinni bleiv tunnilin latin upp fyri almenninginum.

Klaksvíkingar hava havt sín egna sparikassa í mong ár, og Bjarni Olsen nam eisini við virksemið hjá sparikøssunum. Hann segði, at kappingin millum sparikassarnar var sera lítil. Føroya Sparikassi, Norðoya Sparikassi og Suðuroyar Sparikassi høvdu hvør sín part av landinum. Hetta mynstur varð ikki brotið, fyrr enn Suðuroyar Sparikassi lat upp deild í gongugøtuni í Havn, og seinni fekk Norðoya Sparikassi sær deildir í Havn og í Runavík. Men hetta merkir eisini, at nú er kappingin frí, segði Eik-stjórin.



*Høvdingar hittast. Stjórin í Norðoya Sparikassa, Eyðfinn Reyðberg, ynskir Bjarna Olsen, Eik-stjóra, tillukku við nýggja bygninginum*

*Mynd: Jan Müller*

- So nú er ongin góð mamma, tí vit kappast fult út, kundunum bæði í Havn, Saltangará, Klaksvík og annars í øllum Føroyum at gagni. Sjálvt um onkur í hesum figgjarligu døpru tíðum fyri heimin setir spurnartekin við, hvussu sunn fría kappingin er, so ivist eg ikki í, at kapping skal til fyri, at vit sum borgarar og kundar skulu fáa tær bestu og bíligastu vørurnar og tænasturnar, segði Bjarni Olsen.

### Á røttum stað

Hóast Eik Banki ikki fekk sær deild í Klaksvík fyrr enn fyri hálvum øðrum ári síðani, hevði stovnurin viðskiftafólk í Klaksvík og Norðoyggjum, og sambært Bjarna Olsen hevur Eik Banki fingið fleiri nýggj viðskiftafólk hesa stuttu tíðina í Klaksvík, enn roknað varð við.

Tann fyrsti leiðarin hjá Eik Banka í Klaksvík var klaksvíkingurin Eyðun Mørkøre, og eftir tilmæli frá honum bleiv avgjørt at keypa bygningin, sum í síni tíð hýsti bakarínum hjá Haldor Holm. Tað var tó ikki sjálvur bygningurin, sum hevði áhuga, men heldur staðið, sum hann stóð á. Tí bleiv tað gamla bakaríið brotið niður, og í gjár flutti starvsfólkið hjá Eik Banka so í ein spildurnýggjan og sera snotiligan bygning í sjálvum hjartanum í Klaksvík. Bjarni Olsen ásannaði í røðu síni, at onkuir ivaleyst heldur, at tað var skeivt at bróita tann gamla bygningin niður, men hann hel t, at tann nýggi bygningurin er eitt prýði í Klaksvík.

Eyðun Mørkøre arbeiðir ikki í Eik Banka longur, og leiðari á nýggju deildini í Klaksvík er Hilmar Sam Lamhauge av Glyvrum. Afturat sær hevur hann seks kvinnur. Sambært stjóranum